# Íslendskt reggae á G!

**Nógv umtalaði íslendski bólkurin Hjálmar fara at spæla á G! Festivalinum í summar. Bólkurin spælir klassiskan reggae-tónleik**

TÓNLEIKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

G! Festivalurin hevur nú avdúkað enn eitt norðurlendskt navn, sum skal spæla á festivalinum í summar.

Eftir at tveir finskir bólkar og tveir danskir bólkar eru kunngjørdir, eru tað nú íslendskir tónar, sum ljóma.

Hjálmar hava verið eitt tað mest umtalaða navnið í íslendskum tónleiki seinasta árið, og tá ið spurt verður um, hvørji spennandi nøvn eru í Íslandi júst nú, peika fólk ofta á hendan bólkin. Teir hava givið ein góða fløgu út, men teir sigast at vera enn betri live.

– Hjálmar spæla reggae av tí upprunaliga slagnum – ljóðið og andin í tónleikinum er hitt upprunakenda, positiva og innarliga vakra, reggae við rót, sum vit kenna frá t.d. Bob Marley. Hóast Hjálmar eru kritahvítir uttaná og búgva langt her uppi í norðurhøvum, so er ikki at lata seg lumpa – Hjálmar er tann ektaða vøran, sigur G! Festivalurin í tíðindaskrivi.

Hjálmar vunnu tvær íslendskar tónleikavirðislønir í februar mánaða. Onnur var fyri bestu rockplátu og hin var fyri besti nýggi bólkur.

# Signhild fyri fyrstu ferð í býráðið

Signhild Vilhelmsdóttir Joensen á Trøllanesi tók mánakvøldið fyri fyrstu ferð sæti í Klaksvíkar býráði.

Hon umboðar Javnaðarflokkin, og tá ið Torleif Sigurðsson mánadagin bæð um at fáa farloyvi, tók Signhild við.

Javnaðarflokkurin hevur tvey umboð í Klaksvíkar býráð. Eyðgunn Samuelsen er hitt umboðið.

Í løtuni sita fýra kvinnur í býráðnum í Klaksvík. Eyðgunn Samuelsen og Signhild Vilhelmsdóttir Joensen fyri Javnaðarflokkin, Gunvá við Keldu fyri Fólkaflokkin og Jórun Høgnesen fyri Tjóðveldisflokkin.

9

# Ferðabrúgvin er á veg

**Føroyskir tónleikarar fáa betri møguleikar at ferðast uttanlands, tí Norðurlandahúsið og Atlantsflog fara at samstarva um eina sonevnda ferðabrúgv fyri føroyskar tónleikarar**

FERÐING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Føroyskur tónleikur fær í næstum sína ferðabrúgv til og úr Føroyum. Hendan ferðabrúgv skal gera tað lættari og bíligari hjá føroyskum tónleikarum at ferðast út í heim í tónleikaørindum.

Í álitinum um rútmiskan tónleik, sum varð latið Mentamálaráðnum og Vinnumálaráðnum fyrr í ár, var eitt av uppskotinum, at ferðamøguleikarnir hjá føroyskum tónleiki vóru betraðir, tí tað vóru ofta hesir, sum forðaðu fyri, at føroyskir bólkar kundu fara uttanlands at spæla.

Hetta hava Norðurlandahúsið og Atlantsflog gjørt nakað við, og í næstum fara tey at avdúka meira um hesa ferðabrúgv.

– Vit vilja gjarna verða við í hesum samstarvi, tí tað er ein fyrimunur fyri alla Føroyar, at føroyskur tónleikur mennir seg, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi.

## Gera Føroyar áhugaverdar

Ætlanin er, at Norðurlandahúsið skal umsita skipanina, og at føroyskir tónleikarar og bólkar so hvørt kunnu søkja um at fáa stuðul til sínar tónleikaferðir uttanlands.

– Øll menning av føroyskum tónleiki ger Føroyar til eitt meira spennandi land. Vit fáa umtalu uttanlands, og eisini her heima kunnu vit fáa fleiri tónleikaupplivingar á høgum stigi, og tað mennir eisini Føroyar sum ferðavinnuland, sigur Magni Arge.

– Tí vilja vit verða við í hesum samstarvi. Vit stuðla eisini okkara landsliði í fótbólti, og tað ber kanska til at siga, at vit her koma at stuðla okkara landsliði í tónleiki.

Tær ítøkiligu upplýsingarnar um nýggju skipanina eru ikki almennar enn, men tað verða tær í næstum.

# Suð fór á flog

**Við kendum Abba-sangum, blues, jazzi, gospel, funk og enntá rapp á skránni var tað um reppið, at Suð lyftið takið oman av Mentanarhúsinum í Fuglafirði, tá ið kórið hevði konsert har mikukvøldið**

TÓNLEIKUR

*Dávur Winther*



*Kórið Suð hevur fyrireikað seg leingi og væl til konsertir, har millum annað kendir Abba-sangir verða sungnir. Fyrsta konsertin var framúr góð, og nú standa klaksvíkingar og havnafólk fyri tørni um vikuskiftið*

Suð við ABBA hevði hug at lyfta takið uppfrá á Mentanarhúsinum í Fuglafirði í mikukvøldið av berari góðsku.

Tónleikavalið var ómetaliga breitt og krevjandi: Gospel, rock, funck og enntá rap við James Olsen. Blues og jazz kom eisini við í fyrra helmingi. Síðani kom eftir ein steðg pure ABBA.

Av tí, at tað var útselt í Havn, sá eg Havnarfólk og fólk líka úr Suðuroy í tí stúgvandi fulla Mentanarhúsinum í Fuglafirði í mikukvøldið - Meir enn útselt!!

Ringt er at taka nakað burturúr rúgvuni, tí hon kundi øll fara undir heitið: Fantastiskt!

Tó vil er loyva mær at nevna Joyful, Joyful við serstakari útseting av Mervyn Warren, sum kórið og orkestrið megnaði sera væl. Her vísti Arnfríð Lützen sín stóra sangførleika - Ja, hon kundi samanberast við Whitney Houston.

## Hárini reistust

Í ABBA-skránni var er ræddur fyri hvussu tær serstøku duettirnar millum "Annefrid og Agnethu" mundu fara at roynast. Men aftur her var eg positivt yvirraskaður, fyri ikki at siga chokeraður - Hárini reistust! Her var tað aftur Arnfríð Lützen, sum saman við syskinabarninum Nicolina Rubeksen í Chiquitita sungu hárreisandi væl. Ivist onga løtu í, at Annefrid og Agnetha høvdu verið samdar við mær. Ein lyrisk, sterk, klang- og litrík duet í røttum ABBA-stíli, sum bert ABBA kann.

Kórið alt, tónleikarnir í serklassa, dansarnir og sprellibassin Uni Mikkelsen - Ja, har var alt super!!

Tað var stemningur, eggjandi fasar rútmur, tempo, drive, style, klangur, sound - you name it! (mær vantar superlativir) - Ein framúr góð konsert!

## Toppkarakter

Steinvør Fonn, sum er upphavið til alt hetta, er ein sera dugnalig, seriøs og ágrýtin dama, sum tá ið hon setur sær nakað fyri, berjist við hond og fót at náa sínum máli. Og tað hevur hon so sanniliga gjørt til UG+ í hesum føri.

Talan er um eitt arbeiði, gjørt við respekt og hegnisligum tónleikaligum kunnleika um tað, hon er í ferð við.

Teir, ið hava stuðlað og áhoyrarnir hava fingið meir enn valuta fyri pengarnar.

Eftir konsertina kom mær til hugs, "Bert spell, at ein pallur og umstøður annars ikki finnast í Klaksvík, har slíkar stjørnur, sum eru nógvar av í Klaksvík, kunnu hava sín dagligdag". Av seks stjørnum, skulu tit fáa allar!!

Konsert verður við Suð í KÍ-høllini fríggjakvøldið og í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið.

# Atlantsflog oftari til Bretlands

**Atlantic Airways fer nú aftur undir summarflúgvingina til Bretlands, og tað er við nógv fleiri fráferðum tilsamans enn áður. Sum nakað nýtt verður nú eisini flogið til Edinburgh**

FLÚGVING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Atlantsflog fer at hava munandi fleiri fráferðir til Bretlands í summar, enn føroyska flogfelagið áður hevur havt, og Atlantsflog fer sum nakað nýtt at flúgva til Edinburgh.

Flogið verður til Edinburg hvønn leygardag frá 21. mai til 10. september, og tað ber til at sleppa avstað um morgunin og heimaftur um kvøldið.

Ferðirnar millum Vágar og størsta bretska býin, London, verða tvífaldaðar í summar, tí flogið verður nógv longri til London enn undanfarin ár. Fyrsti túrurin til London Stanstead floghavnina fer Atlantic tann 15. mai og hildið verður á til 25. september, ella tilsamans í 20 vikur. Flogið verður báðar vegir hósdag og sunnudag.

– Møguleikarnir eru framúr góðir at ferðast víðri úr Stanstead floghavnini við lágprísfeløgum sum Ryanair og easyJet til nógvar býir kring um í Europa, sigur Atlantsflog í tíðindaskrivi.

Aberdeen hevur verið eitt væl umtókt ferðamál hjá føroyingum, og hendan rutan heldur fram sum vant mánadag og hósdag.

## Pakkatúrar og hópferðir

Ferðaseðlar, pakkatúrar og gistingar kunnu keypast hjá ferðaskrivstovunum og á heimasíðuni hjá Atlantic Airways.

Fonnflog skipar eisini fyri bólkaferðum til London og Skotlands, har skipað er fyri ferðing, gisting og upplivingum, so sum musical og rundferð í London.

– Upplivingarnar og shoppingmøguleikar í London og Edinburgh eru nærum ótømandi, so ein vika gongur skjótt. Men tað ber eisini til at kombinera bæði støðini, so tú flýgur til London og heim aftur úr Edinburgh - ella kanska meiri sannlíkt til Aberdeen og heim aftur úr Edinburgh, sigur Atlantsflog í tíðindaskrivi.